Smábarnabók og myndabók

# Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út eina smábarnabók og eina myndabók

ÚTGÁVUR

**Barnabókin um djór er heitið á einfaldari og fittari myndabók, sum við fotomyndum vísir góðar djóramyndir við løttum teksti, t.d. Hvørji djór eru stríput? Hvussu siga djórini, djóraungar o.s.fr.**

Eisini er spæl, har tú finnur móður og barn ella telur bein. Eitt sindur um djórini, børnunum dámar.

Bókin er 36 bls. í litum, prentað á haldgott papp og kostar kr. 49 í bókahandlunum.

Hestprent stóð fyri prentgerðini.

Bókin er væl hóskandi til 0-2 ára gomul børn.

Tvær mýs á mánanum er smábarnabók, væl egnað til 3-5 ára gomul børn.

Tvær mýs halda, at mánin er so hvítur og vakur. Tær gera av at knýta ein togstiga, ið røkkur heilt upp á mánan, og tær fáa vinin, fuglin, at flúgva upp á mánan og festa stigan. So klintra tær allan tann langa vegin, og framkomnar hoppa og dansa tær ein heilan dag, til tær við eitt varnast jørðina langt, langt burturi og nú leingist teimum. Ja, ja - alt broytist, tað veldst um, hvar tú ert, og hvussu lagið er.

Tvær mýs á mánanum er 34 bls., innbundin og kostar kr. 75 í bókahandlunum.

L. Scuderi hevur skrivað. Eyðna Magnussen týddi. Hestprent stóð fyri prentgerðini.










Á aðalfundi 5. apríl verður lagt fram uppskot um at skipa Føroya Sparikassa sum partafelag.

Tekna teg sum ábyrgdara í Føroya Sparikassa innan 5. apríl 2002. So fært tú møguleikan at gerast partaeigari í Føroya Sparikassa P/F.

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo

# Børn hjálpast úr vanda

**Blái Krossur Føroya er farin undir verkætlan, sum hevur til endamáls at gera fakfólk og foreldur meiri tilvitað um negativu avleiðingarnar av rúsdrekka**

VERKÆTLAN
*Turið Kjølbro*

At nógv børn í Føroyum líða undir rúsmisnýtsluni hjá foreldrunum, hevur ført til, at Blái Krossur Føroya hevur tikið stig til eina verkætlan, ið hevur til endamáls at hjálpa hesum børnum. Felagsskapurin hevur sett eitt fólk, sum burturav skal taka sær av arbeiðinum. Hetta stendur at lesa í Blákrossblaðnum, sum júst er útkomið.

Verkætlanin eitur "Børn í vanda". Felagsskapurin fer í hesum sambandi at skipa fyri skeiðum og kunnandi tiltøkum fyri fakfólk, sum eru um børn dagliga. Endamálið er, at tey betur skulu verða før fyri at hjálpa børnum. Eisini er verkætlanin ætlað foreldrum og avvarðandi.

- Verkætlanin byggir ikki á fremstafingrar ella fordøming á nakran hátt, men roynt verður við sakligari kunning og við at seta spurningar at gera foreldur og avvarðandi tilvitað um trupulleikarnar, soleiðis at tey sjálvi síggja teir og kunnu gera nakað við teir, sigur Ásbjørn Jacobsen, aðalskrivari í Bláa Krossi Føroya við Blákrossblaðið.

Ymiskt upplýsandi tilfar verður í løtuni framleitt. Hetta er norskt tilfar, sum verður týtt og tillagað føroysk viðurskifti. Tað fyrsta kemur út í vár.

Verkætlanin hevur uppruna í Noregi, og haðani eru úrslitini frá arbeiðinum góð, verður sagt.

Ein stór svensk kanning, ið sipað verður til í Blákrossblaðnum, sigur, at jú oftari børn verða boðin rúsdrekka heima, jú meiri drekka børnini, og øvugt. Tveir triðingar av teim ungu, sum vórðu spurd, ið ongantíð høvdu fingið boðið rúsdrekka heima, drukku als ikki, meðan meira enn helmingurin av teimum ungu, ið javnan fingu boðið rúsdrekka heima, drukku minst eina ferð um vikuna.



# Fútin í hernað móti rúsdrekkalýsingum

**Bæði Club 20 og Restorffs bryggjarí eru skuldsett av fútanum fyri brot á lógina um lýsingar við rúsandi løgi. Stjórarnir halda, at lógin er hol í høvdið, tí hon kann als ikki haldast. Teir halda, at lógin skal liberaliserast beinanvegin**

LýSINGAR
*Stefan í Skorini*


*Restorffs bryggjarí verður helst hálað í rættin fyri at lýsa við sínum páskabryggi, sum annars seldi væl, siga eigararnir, ið nú eru skuldsettir. Ákæruritið móti Club 20 er hinvegin longu sent Føroya Rætti.*

*MYND: Jens Kr. Vang*

Fútin er farin í hernað móti rúsdrekka-lýsingum. Fútaskrivstovan hevur fyri stuttum sent Føroya Rætti eitt ákærurit, har víst verður á tvey lógarbrot, ið Club 20 hevur framt í sínum lýsingum í útvarpi.

Løgreglan kannar eisini eina lýsing hjá Restorffs bryggjarí, har lýst verður við sterkum rúsandi løgi.

Finn Ougaard, varafúti, vísir á, hvat rúsdrekkalógin frá 1992 sigur um lýsingar við sterkum rúsandi løgi. Og hann heldur, at lógin er greið á hesum økinum, tí hon bannar øllum lýsingum í føroyskum fjølmiðlum við rúsandi løgi. Hann vísir serliga á grein 19, sum Club 20 er ákært eftir.

Í ákæruritinum verður víst á tvær lýsingar, sum hava verið í Útvarpi Føroya og Rás 2. Onnur var 1. januar, tá Club 20 lýsir við, at alt jólabryggj verður selt fyri hálvan prís. Hin var 1. februar, tá Club 20 lýsir við, at alt í barrini verður selt fyri hálvan prís til klokkan eitt á nátt.

Løgreglan kannar í løtuni eina lýsing hjá Restorffs, har lýst verður, at 42.864 hava nú smakkað páskaløgin hjá bryggjarínum. Her hevur fútin heft seg við orðið "páskaløgur".

Hetta heldur fútin vera í stríð við lógina, og tað skal Føroya Rættur taka støðu til í næstum.

Orsøkin til at fútin hevur valt at taka málið upp nú er eftir øllum at døma, at bryggjarí og náttklubbar í alt størri mun lýsa, sum teimum lystir, og tað skal steðgast.

## Provokera við vilja

Óla-Svenn Nolsøe er stjóri í Restorffs, og hann heldur, at tíðin er komin at liberalisera rúsdrekkalógina, tá talan er um lýsingar við rúsdrekka.

– Henda lógin er hol í høvdið, tí hon er ómøgulig at handhevja. Tað er hinvegin gott, at lógin verður roynd í rættinum, og at vit finna markið, hvørjum vit kunnu lýsa við og ikki, sigur Óla-Svenn. Hann dylur tó ikki fyri, at teir við vilja hava verið provokerandi fyri at royna nøkur mørk á hesum økinum.

Hann vísir á fleiri dømi, at lógin verður brotin, men har myndugleikarnir ikki gera nakað við tað. Tey donsku bløðini lýsa ótarnað við øli og brennivíni, og lýsingar á fylgisveinarásirnar royna at sannføra føroyingar um, at Carlsberg og Tuborg er betri at drekka enn Føroya Bjór og Restorffs.

Stjórin í Restorffs heldur, at tað skal vera eins fyri allar partar, bæði tey útlendsku og tey føroysku bryggjaríini, og at tey føroysku bryggjaríini skulu sleppa at framleiða, selja og lýsa við ølinum.

Bryggjarí skulu sleppa at lýsa, sum teimum lystir, heldur Óla-Svenn. Hann er hinvegin ikki bangin fyri, at hetta fer at økja um misnýtsluna millum fólk, tí talan er heldur um at stjala ein part av marknaðinum frá øðrum útbjóðarum.

## Vánalig lóggeving

Toni Dam er stjóri í partafelagnum, sum eigur og rekur Club 20. Hann sigur, at orsøkin til at teir hava havt lýsingar, ið eru á markinum til tað lógliga, er, at teir vilja vísa á, hvussu langt úti lógin í veruleikanum er.

Hann er irriteraður um, at fútin hevur pilkað júst hansara partafelag burturúr rúgvuni, tí tað eru óteljandi dømi um, at fólk bróta hesa lógina.

Hann vísir á, at vit hava J-dag og P-dag við stórum lýsingarskeltum kring landið, vit hava havt lýsingar við Happy Hour og Double Up í fleiri ár, Rúsdrekkasølan lýsir við upplatingartíðum og donsk lýsingarbløð eru á tremur við lýsingum fyri øli og øðrum sterkari løgi.

Hann vónar, at hetta er við til at skumpa undir politisku skipanina, so hon broytir lógina.


*Óla-Svenn Nolsøe heldur, at rúsdrekkalógin er ómøgulig at handhevja. Hann dylur ikki fyri, at Restorff við vilja hevur provokerað við sínum lýsingum*

*MYND: Jens Kr. Vang*

## Rúsdrekkalógin

§ 19. Øll reklama í føroyskum fjølmiðlum og tíðarritum, útbýting av reklamuseðlum o.t. viðvíkjandi sølu, skeinking og útflýggjan av rúsdrekka er forboðin.

§ 1. Endamálið við hesi lóg miðar ímóti at avmarka rúsdrekkanýtsluna og minka sum mest um skaðan, sum rúsdrekkanýtslan hevur við sær fyri einstaklingin og samfelagið, og til tess at røkka hesum endamáli at áseta reglur í sambandi við rúsdrekka í Føroyum.

# Fekk heilaskjálvta eftir bardaga

HARÐSKAPUR
*Stefan í Skorini*

Leygarnáttina fóru tveir menn til hendurs á Tinghúsvegnum við fyrrverandi bygningin hjá Telefonverkinum. Annar maðurin er sligin og sparkaður so illa, at hann hevur fingið heilaskjálvta og mátti flytast á sjúkrahúsið. Harumframt hevur hann brotið tenn og fingið smærri skaðar.

Ein maður varð handtikin beinanvegin, tá løgreglan kom á staðið, og hann er skuldsettur fyri harðskap. Menninir eru 23 og 24 ára gamlir.

## Herverk og innbrot

Løgreglan hevur harumframt havt nøkur herverk og innbrot at taka sær av. Hósdagin varð brotið inn í ein bil í Havn, og nakrar matvørur eru tiknar. Fríggjadagin varð eisini brotið inn í ein bil, og stereoanleggið er tikið úr bilinum.

Á Gomlurætt hevur onkur verið inni í lítlu húsunum, ið standa á ferjuleguni. Herverk er framt á vesunum í húsunum.

# Herverk í Kunoyartunlinum

HERVERK
*Stefan í Skorini*

Langafríggjadagsmorgun fekk løgreglan í Klaksvík fráboðan um, at herverk varð framt í Kunoyartunlinum. Onkur hevur boygt og oyðilagt skeltini, ið eru fest í veggin, og sum endurskin er á.

Løgreglan sigur, at gerningsmenninir hava nýtt amboð at fremja herverkið, tí hetta kann ikki gerast við handamegi. 26 skelti eru oyðiløgd báðumegin við, og tað darvar bilførarum, tí einki ljós er í tunlinum.

Herverkvið er framt í tíðarskeiðnum frá hóskvøldið til fríggjamorgum, men løgreglan hevur onga hóming av, hvør gerningsmaðurin kann vera.

# Stjól 8.000 frá eldri manni

STULDUR
*Stefan í Skorini*

Langafríggjadag hevði ein eldri maður í Tróndargøtu í Havn óbodnar gestir. Ein brævbjálvi við 8.000 krónum var nevniliga horvin, tá hann kom aftur at húsum. Stuldurin er framdur millum klokkan 17 og 20.

Gerningsmaðurin hevur rótað runt í húsunum og endavent ymsum í leitanini eftir virðismiklum lutum og pengi. Einki bendir á, at maðurin visti frammanundan, hvar peningurin lá.

Húsini vóru ikki læst, og tí slapp maðurin ótarnaður inn eftir peninginum.